VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

**Lærarar til Vinnuháskúlan**

Søkt verður eftir lærarum til maskinmeistaraútbúgvingina og skipsføraraútbúgvingina at byrja 1. august í 2018.

Vinnuháskúlin er í støðugari menning, og vit hava m.a. nýliga sett eina aspirantskipan í verk fyri navigatørar, og ein tilsvarandi skipan fyri maskinmeistaraútbúgvingina er klár at byrja 2018.

Vit sóknast eftir lærarum við nútímans vitan og royndum, ið vilja vera við til framhaldandi at menna skúlan til framtíðar avbjóðingar.

**Lærararnir skulu kunna undirvísa í einari ella fleiri av hesum lærugreinum:**

- Maskintøkni
- Eltøkni
- Automatión
- Virkisbúskapi
- Enskum
- Sjórætti
- Leiðsla og fyriskipan
- Siglingarreglum
- Skipsfyrisiting
- Siglingarfrøði
- Veðurfrøði
- Skipstøkni

**Vit leggja dent á at lærararnir:**

- duga væl at samstarva og samskifta,
- hava áhuga í at læra frá sær,
- hava ein jaligan hugburð mótvegis lesandi og starvsfeløgum,
- stremba eftir at fáa bestu úrslitini,
- áhaldandi vilja menna seg sjálvan og skúlan,
- hava hegni og áhuga í nýggjari tøkni.

**Førleikakrøv**

Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum maskinmeistari ella skipsførari, hava minst 2-ára starvsroyndir og hava staðið bachelorútbúgving frá hægri lærustovni, ella vera í holt við tilsvarandi útbúgving.

Hevur tú bachelor- ella kandidatútbúgving í einari ella fleiri lærugreinum, ert tú eisini skikkaður umsøkjari og kanst undirvísa í hesum lærugreinum.

**Umsóknir**

Eru spurningar um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Wilhelm E. Petersen, stjóra, á teldupostadressu wilhelm@vh.fo ella á telefon 233250.

Umsókn saman við viðkomandi prógvum og lívsrensli skal sendast til: starv@vh.fo.

Viðmerk “Lærarar til Vinnuháskúlan” í yvirskriftina. Freistin at søkja størvini er fríggjadagin 8. juni 2018.

Skúlin tilskilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella ikki at seta nakran av umsøkjarunum í starv.

***Um Vinnuháskúlan***

*Vinnuháskúlin bjóðar góðar og breiðar útbúgvingar við bestu leiðsluførleikum, ið kunnu brúkast bæði á sjógvi og landi. Vinnuháskúlin fevnir um navigatiósnskúla, maskinmeistaraskúla, trygdardepil og skeiðsdeild. Føroyingar hava altíð verið eitt siglandi fólk, og tí eru maritimu útbúgvingarnar eisini millum elstu útbúgvingar í Føroyum. Í 1893 byrjaði sjómansskúli í Føroyum, og í 1912 vóru fyrstu motorpassaraskeiðini hildin. Á skúlanum starvast uml. 50 starvsfólk. Skúlin er útgjørdur við nýggjastu tøkni til at stimbra og fjøltátta frálæruna. Les meira á heimasíðu skúlans www.vh.fo*

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING